# UMHVØRVIS- OG ORKUPOLITIKKUR

REINUR OG FRÍUR KLAKSVÍKAR BÝUR



# FORORÐ

Umhvørvi og orka eru tvey hugtøk, sum gerast alsamt sjónligari og týdningarmeiri í gerandisdegnum hjá øllum okkara. Klaksvíkar kommuna vil saman við borgarum og vinnulívi tryggja, at umhvørvið verður varðveitt, og at orkan er burðardygg soleiðis, at komandi ættarlið fáa eina kommunu, sum er í góðum standi. Vit vilja vera tilvitað og miðvís í strembanini eftir at taka við avbjóðingunum, sum standast av hesum, og leggja doyðin á at økja tilvitanina um umhvørvi og orku og ávirka hugburð og atferð hesum viðvíkjandi.

Nýggjar tíðir seta nýggj krøv og geva eisini nýggjar møguleikar. Samstundis sum kommunan vil vera fyri øll og fjálga um bæði borgarar og vinnulív, vilja vit ganga undan og vera burðardygg í umhvørvis- og orkumálum. Til tess at fáa hetta at javnviga væl er neyðugt at hava eina orðaða ætlan, sum ger tað ítøkiligt, hvat tað er, vit ætla okkum, og hvussu vit koma hagar. Hetta er orsøkin til henda umhvørvis- og orkupolitikkin hjá Klaksvíkar kommunu.

Ætlanin hjá Umhvørvis- og Býarskipanarnevndini við hesum politikki er, at vit skulu tryggja burðardygga menning og trivnað inn í framtíðina.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin**

## INNLEIÐSLA

Við hesum politikki setur Klaksvíkar kommuna umhvørvi og orku á breddan. Bæði borgarar og vinnulív, nú sum komandi, hava rætt til góðar umstøður og kor, og kommunan vil miðvíst stremba eftir at skapa neyðugu karmarnar at røkka hesum málum.

Endamálið við hesum umhvørvis- og orkupolitikki er at gera greitt, hvar Klaksvíkar kommuna ætlar sær at vera ár 2020 og 2030, og hvussu komið verður hagar. Politikkurin hevur støði í málinum at verða grønasta kommunan og fylgja almennu málunum hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum fyri útlát av veðurlagsgassi í 2020 (Politiska avtalan er, at tað føroyska útlátið av veðurlagsgassi skal skerjast við í minsta lagi 20% í 2020 sammett við útlátið í 2005). Kommunan vil hyggja enn longur fram, eins og SEV, heilt fram til 2030.

Kommunan hevur á heimasíðu sínari tilfar um fleiri øki, nevnd í hesum politikkinum, og verður tí víst til heimasíðuna um meiri kunning. Tað verður gjørt við einari væl virkandi og dagførdari heimasíðu, www.klaksvik.fo.

Hesin politikkur verður endurskoðaður hvørt fjórða ár.

## TILGONGDIN

Klaksvíkar býráð samtykti eftir tilmæli frá Umhvørvis- og Býarskipanarnevndini at orða umhvørvis- og orkupolitikk fyri Klaksvíkar kommunu.

Endamálið við politikkinum er at gera ynski um at verða grønasta kommuna ítøkiligt. Tað kemst ikki av sær sjálvum, men merkir, at kommunan má seta sær greið mál um, hvat tað merkir og eisini hvussu málini verða nádd.

Tilgongdin at orða politikkin lagar seg eftir ynskjum og málsetningum hjá kommununi. Hon skal endurspegla tørv og ynski hjá borgarunum í kommununi, tað veri seg vanligar borgarar, stovnar og virki og starvsfólk hjá kommununi. Samstundis hava vit tikið yrkiskunnleikan við upp á ráð í tilgongdini. Skipað varð fyri almennari hoyring á heimasíðuni hjá kommununi, og fyri hoyringaverkstovum fyri virki og stovnar í kommununi, starvsfólki í kommununi og fyri fakfólki, umboðandi Umhvørvisstovuna, SEV, IRF, og Heilsu- og Innlendismálaráðið. Oljufeløgini, Heilsufrøðiliga starvsstovan og FNU vórðu eisini boðin við. Alt varð gjørt fyri at fáa eina so góða og samanhangandi breidd sum gjørligt.

## VISJÓN

Klaksvíkar kommuna ætlar sær at vera tann grønasta kommunan. Tað merkir, at vit vilja ganga undan, bæði tá ið talan er um umhvørvi og orku. Hesi bæði skulu sjálvandi ganga hond í hond við búskapi (Environment, Energy og Economy).

Samstundis sum kommunan gongur undan og eggjar borgarum og vinnulívi at fylgja við, síggja vit týdningin av persónligum frælsi, t.d. um orkan verður ov dýr, fáa ávísir bólkar trupulleikar. Kommunan eigur at vera við til at minka um sveiggini.

Umhvørvisatlit (Environmental Impact Assessment) og planlegging eiga at vera ein samrunnin partur av øllum, sum kommunan setur í verk viðvíkjandi umhvørvi og orku.

Kunning er týdningarmikil, og heimasíðan eigur at hava greiða, dagførda kunning.



## UMHVØRVIÐ

Vit varða øll av okkara umhvørvi, og kommunan ætlar sær at ganga undan at virka fyri at røkja umhvørvið og fyribyrgja at farið verður illa um.

Árinskanningar eiga at verða gjørdar, áðrenn farið verður undir stórar útbyggingar, t.d. tá ið grótbrotið verður flutt.

**VATN**
Vatn er ein týðandi partur av tilveruni hjá øllum borgarum og eisini hjá fleiri vinnuvirkjum. Vatnverkið skal góðkennast, av Heilsufrøðiligu starvsstovuni sum skjótast.

Spillvatn skal leiðast ígjøgnum hóskandi reinsiskipan soleiðis, at ásett markvirði kunnu verða hildin, áðrenn tað verður leitt í kommunala kloakk. Harafturat skal reinsiskipanin røkjast soleiðis, at hon altíð virkar til fulnar. Luftútlát má ikki vera til ampa, og treytir eru fyri at skilja, goyma og avhenda burturkast.

Spillvatnsleiðingar skulu lúka krøvini í kunngerð nr. 111 frá 7. sept. 2009 um spillvatn. Tað merkir, at allar kommunur skulu hava eina spillvatnsætlan, sum er góðkend av Umhvørvisstovuni.

**ENDURNÝTSLA**
Endurnýtsla er eitt týdningarmikið hugtak, tá ið umhvørvið verður røkt. Kommunan hevur eitt væl virkandi bingjupláss, og vit fara alsamt at betra tað soleiðis, at tað verður lættari at skilja rusk og gagnnýta tað, sum kann verða endurnýtt.

Spillhiti frá virkjum skal gagnnýtast við at binda í sjóhitaskipanina, so hvørt sum hon verður útbygd.

Arbeitt verður fram ímóti at gera matspillu hjá stovnum til sankutøð. Byrjað verður við barnagørðum, og síðan skulu bæði vinnulív og húsarhald gera tað sama, men tað má verða væl skipað, so tað ikki elur rottu og onnur skaðadjór.

Vit hyggja eftir ringbúskapi viðvíkjandi burðardyggari framleiðslu og royna altsamt at gerast grønari og at endurnýta alt.

**BURTURKAST**
*Reinur og fríur Klaksvíkar býur* er slagorð kommununnar. Kommunan skal ganga undan og skipa fyri, at lætt verður at halda kommununa reina. Tað skal gerast við at seta fleiri ruskíløt upp og áhaldandi kunna um og eggja til at brúka tey. Eisini eigur kommunan at skipa ruddingardagarnar enn betur. Tað kann verða gjørt við at hava fleiri dagar, t.d ein um várið, fyrst og fremst til at gera tún og urtagarðar o.a. klár til summarið, og ein um heystið, sum leggur dent á at gera tún og urtagarðar o.a.klár til veturin. Skipað kann verða fyri kapping ímillum býlingar og bygdir um at vera ruddiligast.

Havnar- og vinnuøki skulu ruddast og forðað verður fyri, at burturkast verður sett har ella aðrastaðni. Sum nevnt undir Endurnýtslu, hevur kommunan eitt vælvirkandi bingjupláss, og tað skal gerast uppaftur betri og skipað verður fyri at savna innsavningina á einum vælvirkandi bingjuplássi fyri alla kommununa. Tað skal virka so væl, at burturkast ikki verður liggjandi ella sett á skeivt stað.

**DÁLKING**

Almenna umhvørvislóggávan hevur til endamáls at verja umhvørvið fyri mannaskaptari dálking bæði á sjógvi og landi. Ein skipan við umhvørvisgóðkenningum av serliga dálkandi virkjum skal tryggja, at dálkingin ikki verður størri enn tað, ið samfelagið kann góðtaka. Kommunan skundar undir at fáa viðkomandi virki at fáa sær umhvørvisgóðkenning.

Greiðar reglur eru um oljudálking á sjógvi, men reglurnar um oljudálking á landi eru ógreiðari. Oljutangar, ið fara at leka, eru vandi fyri umhvørvi. Tað er skylda borgaranna at fyribyrgja lekum, og kommunan vil hjálpa borgarum at fyribyrgja hesum.

**ÚTLÁT**

Allur heimurin hevur sett útlát í brennidepilin. Tað kann mátast og gerast ítøkiligt. Kommunan vil fylgja almennu myndugleikunum, sum hava ásett, at útlátið av veðurlagsgassi skal skerjast við í minsta lagi 20% í 2020 í mun til útlátið í 2005. Kommunan ætlar sær at halda á við hesi gongd og skerja útlátið við øðrum 20% fram til 2030. Hetta verður m.a. gjørt við, at allir kommunalir bygningar verða grønir í 2030.

**ROYKUR OG LARMUR**

Roykdálking er ein trupulleiki bæði frá skipum, sum liggja við kai, og frá grannum, sum hita sær húsini og annað við brenniovnum.

Skip, sum liggja við kai og brúka ljósmotorarnar, eru mangan til ampa fyri borgarar við royki og larmi. Kommunan ætlar at brúka kommunufelagið at trýsta landið at gera felags treytir fyri kommunurnar viðvíkjandi larmi og royki frá skipum.

Landstreymur er tøkur, og kommunan fer at virka fyri, at skip, sum liggja við kai, ikki brúka ljósmotorarnar yvirhøvur, tá ið vit skriva 2020.

Brenniovnar og hitapottar er eitt tað, ið dálkar mest í íbúðarøkjum. Kommunan er umhvørvismyndugleikin á staðnum og fer at gera eina vegleiðing um, hvussu farast skal fram og eisini, hvussu gerast skal, um klagað verður.

## DJÓR

### Húsdjór

Høvuðsreglan er, at húsdjór sum hundar, kettur og flogfenaður ikki eru til ampa hjá grannum og øðrum. Hundar og kettur, sum ganga leys, verða tikin. Reglugerð er gjørd um tað, og eisini um flogfenaðhald. Meiri kunning fæst á heimasíðuni.

Kommunan ætlar at gera fleiri øki til hundar at vera á og at fáa fólk at taka hundalortin upp.

### Skaðadjór

Skaðadjór skulu týnast mest møguligt. Nøkur øki eru rottufrí og eiga at verða hildin frí, samstundis sum rottan verður hildin niðri, har sum hon longu er.

## TAÐING

Sambært kunngerð um umhvørvisreglur skulu tøð frá køstum og mykjubrunnum verða nýtt til taðing soleiðis, at tað ikki dálkar áir ella er til ampa fyri fólk, ið búgva nærindis.

Umhvørvisstovan hevur gjørt vegleiðing um at taða og goyma tøð, sum útgreinar ásetingar í kunngerðini um umhvørvisreglur og í løgtingslógini um umhvørvisvernd. Kommunan hevur eftirlit við, at ásetingarnar í kunngerðini verða hildnar

## DYRKING

Kommunan raðfestir plantur og trø frammarlaga og ætlar sær at halda fram at planta ymsastaðni í kommununi. Arbeiðið at gera býin grønari við plantum er byrjað.

Skøra og aðrar sjálvmennandi plantur, órógva alt meira, og kommunan arbeiðir við at halda hesum vøkstri niðri. Ein ætlan skal gerast soleiðis, at borgarar og kommunan í felag fáa skøruna burtur fyri 2020.

Kommunan arbeiðir við at fáa moldina til sættis og goyma og selja hana til borgarar.

## HEILSA OG FRÍØKI

Í sambandi við miðbýarætlanina verða betri umstøður til heilsu og rekreatión. Kommunan skal skipa fríøki, har øll kunnu kenna seg væl, og har ung og gomul trívast saman í tryggum kørmum. Fríøkini skulu hýsa tiltøkum. Kommunan ætlar eisini at halda og umvæla gøtur ímillum bygdir.

## GRÓTBROT

Grótbrot eru stór inntriv í náttúruna, og kommunan ætlar sær at prýða tey grótbrot, ið eru, soleiðis at tey verða minni sjónsk. Grótbrotið á Bumshamri skal tyrvast og fyllast aftur soleiðis, at økið aftur verður, sum tað var framman undan inntrivið.

Umhvørvisárin eiga at kannast, áðrenn nýtt grótbrot verður gjørt, og møguleiki fyri at gera tunnlar heldur enn grótbrot, eiga at verða kannaðir betur. Her skal kost/nytta vigast upp ímóti umhvørvisárinum.

Hond skal takast um Grønhøvda, og økið skal gerast til eitt grønt øki. Hetta skal gerast stigvíst og verða liðugt í 2025.



# ORKA

Nútíðarsamfelagið nýtir alsamt meiri orku bæði til hita, streym og flutning, og vøksturin økist bara við tíðini. Prísurin er hitalagsbroytingar, sum mugu steðgast. Klaksvíkar kommuna vil vísa ábyrgd og ganga undan í hesum arbeiðinum.

## HITI

Kommunan er í gongd við eina umfatandi sjóhitaverkætlan, har ætlanin fyrst er at hita stórar kommunalar bygningar í miðbýnum, s.s. Skúlatrøð og ítróttarøkið. Seinni er ætlanin at fara víðari til onnur øki í býnum.

Í sambandi við at bygdir verða nýggir stovnar, skúlar og annað fylgir kommunan almennu reglugerðini um bjálving, hitatap og luftskifti.

Ein ætlan skal gerast fyri, hvussu verandi bygningar verða effektiviseraðir við bjálving og luftskifti og minkaðum hitamissi.

**STÝR ORKUNÝTSLUNA OG GER HANA SJÓNLIGA**

Klaksvíkar kommuna ætlar at brúka orkuvarðan, sum er úrslit av ST samtykt í altjóða umhvørvisavtaluni í Kyoto, Japan, í 1997, og í Dansk Bygningsreglement fra 2008, 2010 ella 2015?

So hvørt sum tøknin mennist, fer kommunan at kanna møguleikarnar at endurvinna spillvatnshitan í stórum kommunalum bygningum og knýta upp í sjóhitaskipanina, so hvørt sum hon verður útbygd.

Kommunan kann í ávísum førum stuðla feløgum og persónum, sum vilja hava grønari profil ella at granska og førleikamenna seg innan økið.




**RAVMAGN**

Eins og við hita fer kommunan at brúka orkuvarðan og Dansk Bygningsreglement í sambandi við streymnýtslu.

Kommunan er farin at brúka LED gøtuljós, og ætlanin er at útbyggja tey so hvørt, soleiðis at øll gøtuljós í kommununi eru LED og verða stýrd effektivt í 2020.

**FLUTNINGUR**

Flutningur á landi og sjógvi eigur at verða skipaður betur soleiðis, at útlát av veðurlagsgassi í 2020 verður minkað við í minsta lagi 20% í 2020 sammett við útlátið í 2005.

Kommunan skipar fyri busskoyring millum ymsu býlingarnar í Klaksvík. Í samstarvið við SEV er løðistøð sett upp í býnum. Kommunan fer at nýta el-bussar, og allir bilar hjá kommununi skulu vera el-bilar í 2020.

**SKIP OG BÁTAR**

Umhvørvisstovan hevur ábyrgd á økinum, og kommunan ætlar at fylgja lands- og altjóða krøvum í sambandi við flutning við skipum og bátum.

## KLAKSVÍK, EIN GRØN KOMMUNA

Klaksvíkar kommuna hevur við hesum orðað ein politikk fyri umhvørvi og orku. Hetta er eitt arbeiðsskjal hjá sitandi og komandi býráði at hava sum grundarlag undir politiska og umsitingarliga arbeiðinum.

Politikkurin staðfestir, hvar vit eru í løtuni, og vísir, hvagar vit ætla okkum at verða bæði í 2020 og 2030. Sjøtul er settur á, og kommunan gongur undan við víðfevndu sjóhitaskipanini og við at bjóða fyrstu almennu løðistøðina til el-bilar. Tað hevur týdning, at politikkurin er festur í fólkinum her í kommununi, og tí fer kommunan at ganga undan og fáa borgarar og vinnulív at fylgja við.

Alt tað, sum hesin politikkur nevnir, skal verða gjørt ella kannað, skal verða gjørt fyri 2020, er annað ikki nevnt.

Vit ynskja og vóna, at hesin politikkur skal skapa eina neyðuga og spennandi menning í kommununi, soleiðis at hon verður burðardygg og grøn og fer at styrkja hana í framtíðar avbjóðingum. Tað hevur serstakliga stóran týdning fyri komandi ættarlið, sum fara at virka og búleikast her.

Býurin hevur í mong ár brúkt slagorðið *„Reinur og fríur Klaksvíkar býur“*. Hetta ynskja vit nú at víðka til, at vit vilja verða tann grønasta kommunan. Bæði í næsta ár og í 2020 og 2030.

Fyri at náa málinum og halda okkum á kósini verður hesin politikkur endurskoðaður fjórða hvørt ár.



KLAKSVÍKAR KOMMUNA